# Kend útvarpsrødd aft

**Royndi útvarpsmaðurin, Janus Mohr, hevði í dag sína fyrstu sending á Rás2. Sendingin var tann fyrsta í eini røð av stuttum sendingum, sum verða sendar hvønn gerandisdag í árinum. Í ár verða 210 sendingar á skránni**

RÁS2
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Klokkan átta í morgun hoyrdist ein rødd á Rás2, sum flest allir føroyingar munnu kennast við. Nærlagdi og dugnaligi útvarpsmaðurin Janus Mohr setti sjálvur hol á eina nýggja sendirøð, sum hann eigur hugskotið til og samskipar.

Sendirøðin kallast Føroyar mítt land, og ein sending á 5 minuttir verður send hvønn gerandisdag. Fyrsta sendingin, sum varð send í morgun og verður aftur at hoyra í kvøld klokkan 22.00 og 23.00, snúði seg um húsið, har Rás2 og Sosialurin halda til – gamla Rybergs handil.

- Útvarpsarbeiði er blivin ein rutina, so eg husaði ikki so nógv um tað, nú hendan fyrsta sendingin fór í luftini, men hetta er eitt stuttligt projekt. Eg eri ovfarin av góðu undirtøkuni, sum vit hava fingið frá teimum, sum vit hava heitt á um at verða við í sendirøðini. Higartil hava vit fingið millum 20 og 25 fólk at verða við, og innihaldið verður sera fjølbroytt, sigur Janus Mohr.

## Hugskot úr Danmark

Føroyar mítt land er ein sendirøð við stuttum sendingum hvønn gerandisdag. Tær verða skipaðar soleiðis, at ein persónur fær ella sjálvur kemur við einum evni, sum viðkomandi hugleiðir um. Onki mark er fyri, hvat evnið kann vera, bara tað hevur nakað við Føroyar at gera.

Millum evnini, sum verða tikin upp fyrstu tíðina, eru lágtrýst fyrr og nú, Guttorm í Múla, Livurhøgg, Svartideyði, Amtmanshúsini, Sjóverk, Gold Star og blá bók, Kórsangur á Toftum, Mikkjal í Lamba, Kvívíks Jógvan og Ólavur á Heygum.

Tað er kendi útvarpsmaðurin ígjøgnum ein hálvan mansaldur, Janus Mohr, ið eigur hugskotið, og sum samskipar sendingarnar. Janus Mohr sigur, at íblásturin til sendingarnar kemur frá Danmarks Radio, sum í meiri enn 20 ár hevur koyrt sendirøðina, tey kalla »Danmark kort«.

- Eg hugsaði, at hetta átti at vera ein sera vælegnaður leistur at gera sendingar eftir her hjá okkum, sigur Janus Mohr, sum longu hevur hugskot til eini 200 sendingar, harav ein fjórðingur er avtalaðar við ymisk fólk at gera. Tær fyrstu nógvu sendingarnar eru longu upptiknar og klárar at senda. Sent verður hvønn gerandisdag í vikuni.

## Nógv kann sigast í fimm minuttir

Janus Mohr, ið sjálvur hevur gjørt fleiri av sendingunum, leggur dent á, at hann fegin vil hava samband við fólk, sum hava hugskot til evni at taka upp. Hann vísir á, at tað stórt sæð onki mark er fyri, hvat sendingarnar kunnu snúgva seg um. Bara talan er um hendingar, støð, persónar ella viðurskifti, sum hava við Føroyar at gera.

Síðani sendirøðin varð kunngjørd á Rás2 í farnu viku, hava fleiri fólk vent sær til hansara við hugskotum, og Janus Mohr er fegin um stóra áhugan fyri sendirøðini.

- Tað verður spennandi at vita, hvussu lurtararnir fara at taka ímóti eini sendirøð, sum hevur so stuttar sendingar sum hendan. Men tað kann nógv sigast í fimm minuttir, sigur hann.

Janus Mohr hevðu í nógv ár sendingar í útvarpinum, og ikki minst hansara sendingar millum klokkan 13.40 og 14.00 sunnudagar eru kendar millum fólk.

- Eg gjørdi næstan 1100 sunnudagssendingar í Útvarpinum, og nú er tað stuttligt at byrja av nýggjum, sigur Janus Mohr.

Hann er kendur fyri at verða neyvur í sínum arbeiði, og tað umfatar eisini longdina á sendingunum.

- Tá ið tú hevur fingist nógv við útvarpsarbeiði, verður tað ein sportur at fáa tíðirnar at passa upp á sekundið. Tað eigur tað at gera í útvarpi, sigur Janus Mohr.

Hann hevur nú havt sína fyrstu sending á Rás2, men nógvar sendingar eru í væntu. Í hesum árinum verða heili 210 sendingar í sendirøðini Føroyar mítt land.

Sendingarnar eru at hoyra á Rás2 klokkan 8 og 9 um morgunin og klokkan 10 og 11 um kvøldið.



*Hvønn dag koma gæsnar á vitjan hjá Janusi Mohr*


*Djórini fylla nógv í lívinum hjá Janusi Mohr*

## FAKTA

**Hesi fólk eru við í sendirøðini Føroyar mítt land hesa fyrstu vikuna:**
Mán 3/3: Janus Mohr
Týs 4/3: Helena Samuelsen
Mik 5/3: Magnus Gunnarsson
Hós 6/3: Halgir Winther Poulsen
Frí 7/3: Freydis Poulsen

Føroyar mítt land verður sent hvønn gerandisdag, kl. 8, kl. 9, kl. 22 og kl. 23.